## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, um kvøldið hækkar hann upp í norðan og veksur vindin til skrið. Sólglottar, men kanska okkurt ælið og hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í skrið av norði og ælingur, men sunnudagin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Stór heystmótasýning á Torginum í SMS

**Í annaðkvøld, hóskvøldið, kl. 19.30 verður stóra heystmótasýningin hjá handlunum í SMS. Høvi verður at síggja stílin og mótan, ið fara at eyðkenna komandi veturin**

MÓTASÝNING
*Tíðindaskriv*

Hetta er 25. árið á rað, at skipað verður fyri mótasýning í SMS. Tey í SMS lova eina forkunnuga og spennandi sýning, sum verður upp aftur størri enn vanligt, tí nú verða barnaklæðini eisini víst um kvøldið. Tey hava annars verið víst dagin eftir vanligu sýningina.

Luttakandi handlarnir vera: Demmus, Vero Moda, Flykran/Fríðkan, Skilling, Deres, Benetton, Sportmaster, Klivin og Skálkur.

Fyriskipari í ár Anna Kristin Bæk, sum í summar varð útlærd sniðgevi á Columbineskolen á Frederiksberg í Danmørk. Yrkisdreymurin, tá ið Kristin flutti niður, var at gerast sjónleikari. Og hóast seinasta royndin at sleppa inn á sjónleikarskúla kanska ikki enn er gjørd, vildi Kristin royna aðra útbúgving, ið kundi nýtast í sjónleikarheiminum. Kristin hevur leingi havt stóran áhuga fyri klæðum. Hon hevur mestsum altíð seymað og pyntað klæðir og tilhoyr til seg sjálva. Sostatt fall tað henni natúrligt at gerast sniðgevi. Ætlanin er at nýta útbúgvingina at seyma búnar og tílíkt til leiklistafólk.

Hetta er fyrstu ferð, at Kristin roynir seg við mótasýning. Áður hevur hon ofta spælt sjónleik og sungið. Hugflog hennara er gott, og í SMS eru tey sera spent at síggja sýningina.

Aftur í ár verður okkurt til matna. Borð, ið viðskiftafólk kunnu seta seg við at njóta ein bita aftur við sýningini, verða sett upp.

Atgongumerki á 50,- fáast til keyps í luttakandi handlunum. Loypa atgongumerki av, verða tey seld við dyrnar.



*Tað er Anna Kristin Bæk, sum skipar fyri heystmótasýningini í SMS í annaðkvøld. Hon varð í summar úrlærd sum sniðgevi á Columbineskolen í Frederiksberg í Danmark*



### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 6 |
| Halifax | 7 |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 16 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 17 |
| Róm | – |
| Malorca | 22 |
| Athen | 21 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 11 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | 21 |
| New York | 12 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1032 hPa yvir Grønlandsfjørðinum viknar. Eitt djúpt lágtrýst, 976 hPa sunnan fyri Írland fer í landnyrðing.




Djúpa lágtrýstið eystan fyri Skotland fer spakuliga norðureftir og gevur nógvan vind á okkara leiðum teir fyrstu dagarnar.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/10 kl. 06[00]– 22/10 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 2,4°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 21/10 kl. 06[00]– 22/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 39,9 mm


**Vika 42 – 20. oktober**

1. Centrum:
**20 - 74 - 01 - 18 - 26 - 05 - 02 - 55 - 52 - 35 - 41**

1. Ramme:
**70 - 37 - 48 - 69 - 75 - 04 - 66 - 23 - 09 - 73 - 12 - 06 - 40 - 16 - 14 - 46 - 30 - 45 - 59 - 67**

Fuld plade:
**25 - 68 - 10 - 51 - 08 - 49 - 19 - 38 - 17 - 47 - 31 - 03 - 29 - 57**

Fri spil: **BOX__**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **537.070,- kr** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **116.250,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **14.557,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **524,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **42,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum


## VESTFALLSKYRRINDI

20. okt.: Mánin longst frá jørðini
21. okt.: Fullmáni
29. okt.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. okt. | 08.38 | 20.58 | 07.38 | 19.58 | 07.53 | 20.13 | 10.38 | 22.58 | 11.38 | 23.58 | 06.53 | 19.13 | 05.53 | 18.13 | 08.53 | 21.13 | 09.53 | 22.13 | 08.23 | 20.43 | 09.38 | 21.58 |
| 24. okt. | 09.19 | 21.40 | 08.19 | 20.40 | 08.34 | 20.55 | 11.19 | 23.40 | — | 12.19 | 07.34 | 19.55 | 06.34 | 18.55 | 09.34 | 21.55 | 10.34 | 22.55 | 09.04 | 21.25 | 10.19 | 22.40 |
| 25. okt. | 10.02 | 22.24 | 09.02 | 21.24 | 09.17 | 21.39 | — | 12.02 | 00.40 | 13.02 | 08.17 | 20.39 | 07.17 | 19.39 | 10.17 | 22.39 | 11.17 | 23.39 | 09.47 | 22.09 | 11.02 | 23.24 |
| 26. okt. | 10.47 | 23.11 | 09.47 | 22.11 | 10.02 | 22.26 | 00.24 | 12.47 | 01.24 | 13.47 | 09.02 | 21.26 | 08.02 | 20.26 | 11.02 | 23.26 | — | 12.02 | 10.32 | 22.56 | 11.47 | — |

5 707265 100036 >